# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



*Her ruddar ein JCB-gravimaskina vegin fyri einum sjúkrabili*



*Vørubilurin hjá Jógvani Danielsen ger ein roynd at koyra vøru út til handlar í býnum*

Fyri 25 árum síðan:

## Kavaódnin í 1984

Ein tann størsti kavin, nakar veit um í nýggjari tí, var fyrstu dagarnar í 1984.

Kavaódnin brast á mánakvøldið 2. januar, og týsdagin 3. januar lá so gott sum alt virksemi í landinum stilt, ferðslan steðgaði heilt upp og einasti mátin at koma nakran veg var at fara til gongu.

Fleiri staðir í landinum var streymslit, og t.d. flogferðslan varð tarnað av at fólki, sum ikki kundu koma til flogvøllin. Í Vágum hendu eisini stórir skaðar.

Kollfjarðatunnilin var ikki komin tá, og fólk sum ikki komu vegin fram á Oyggjarvegnum máttu gista á støðini í Mjørkadali.

*Kelda: Sosialurin hósdagin 5. januar 1984*

## Realskúlamynd frá 1937



*Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007.*
*Myndin er tikin í Realskúlagarðinum í 1937. F.v.: Astrid Thomsen, Gøtu, Kjartan Hentze, læraraskúlanæmingur, Aslaj Thomsen (Nielsen) og Richard Long, lærari.*
*Um onkur hevur hug at ogna sær myndina, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 327).*

*Myndaeigari: Hjørdis á Argjaboða*

## Andlát og jarðarferðir

**Hans Hammer Krossá,** ættaður av Eiði, búsitandi í Danmark, andaðist á Hvidovre Hospitali tann 5. januar, 78 ára gamal.

**Håkon Joensen,** Stokksoyri, Klaksvík, andaðist mánadagin, 81 ára gamal.

**Henning Heinesen,** ættaður úr Porkeri búsitandi í Helsingør, andaðist á Helsingør Hospital, 76 ára gamal.

**Jógvan Hendrik Samuelsen,** Tvøroyri, andaðist 5. januar, 66 ára gamal.

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaða kona mín, mamma, omma og systir okkara

**Brigitte Hammer**
fødd Schrøder

andaðist 2. januar 2009 á sjúkrahúsinum í Gehrden í Týsklandi.
Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum í Gehrden 9. januar kl. 10.30.

*Heilsan við Joh. 11,25.*

*Vegna tey avvarðandi*
**Marnar Hammer,**
**Petra Meyer, Christopher, Gerhard Schrøder og Klaus Schrøder**

Tey, sum ynskja at minnast Brigitte, kunnu lata eina peningagávu til SOS-Børnebyerne, konta í Føroya Banka, mrk. Brigitte.

---

## Dagurin

**7. januar. Knútur hertogi**. Talan er um sonin hjá danska konginum Erik Ejegod. Hann varð myrdur av systkinabarni sínum Magnusi henda dag í 1131. Í danskari søgu verður hann róptur Knútur Lávardur, ið er sama orðið sum tað enska lord, ið merkir harri. Knútur varð skírdur halgimenni í 1169. Navnið Knútur er kanska upprunaliga norrønt og merkir júst knútur, brúktur sum eyknevni. Ella kanska er tað gamalt týskt navn: hin (hug)*djarvi*.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

planet.fo